## Heilsumát verða tikin




Hjartafelagið skipar um vikuskiftið fyri tiltakið, har tey vitjandi kunnu máta ymisk heilsulig lyklatøl. Tiltakið verður í veitsluhøllini hjá Landssjúkrahúsinum fríggja- og leygardagin.

Høvi verður at fáa blóðtrýst, hædd-vekt (BMI), kolesterol og blóðsukur mátað. Eitt lítið spurnarblað verður at útfylla. Ymiskt kunningartilfar verður til taks, og fólk frá hjartafelagnum svara spurningum. Eisini verður ein kostráðgevi, ið gevur vegleiðing um kost og vísir ymiskar heilsugóðar rættir. Kunningartilfar, blóðtrýstmáting og BMI-máting eru ókeypis. Blóðroyndin (kolesterol/blóðsukur) kostar 50 kr.

## Kaupthing er gott pappír

Seinasta kredittmetingin frá Moody's Investor Service hevur flutt Kaupthing enn eina deild upp. Langtíðar skyldurnar hjá Kaupthing, so sum lánsbrøv og langtíðar innlán, verða nú mett sum Aaa, ið er hægsta kredittmeting. Kaupthing hevur eina tíð havt hægstu kreditt-metingina innan stutt-tíðar skyldur, og nú verða langtíðarskyldur felagsins altso mettar eins høgt.

# Umhugsa at banka upp á hjá Jacobi Vestergaard

**Nólsoyingar eru vónbrotnir av, at teir fáa ikki svar úr landsstýrinum og nú føla teir, at tað góða samskiftið við Landsstýrið er í vanda**

NÓLSOYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo



*Nýggj Rita er harðliga tiltrongd og nólsoyingar strongja á fyri at fáa gongd á málið. Men teir eru vónbrotnir um, at teir onki frætta aftur úr landsstýrinum*

Tað er ikki at undrast yvir, at Nólsoyingar síggja nakað stórt í, at Landsstýrið hevur boðað frá, at nýtt skip skal útvegast til nólsoyarsiglingina fyri Rituna, sum hevur tænt fyri seg og sum tíðin nú er runnin undan.

Og tá ið Ritan skal tæna nólsoyingar, vilja teir eisini hava ein virknan leiklut, tá ið tað verður gjørt av, hvussu nýggja ritan skal vera.

Tí settu teir ein arbeiðsbólk at røkja áhugamálini hjá nólsoyingum. Talsmaðurin hjá arbeiðsbólkinum, Jákup av Skarði, er vónbrotin av landsstýrismanninum í innlendismálum.

- Vit hava longu í november í fjør heitt á Jacob Vestergaard um at fáa fund um nýggju Rituna.

Tað er heldur ikki undarligt, at nólsoyingar strongja á fyri at fáa tað at ganga skjótt.

Tí vilja teir hava at vita frá Jacob Vestergaard, um hann er sinnaður at samstarva við Nólsoyingar um at arbeiða so, at alt tilfarið kann vera klárt mitt í summar, í góðari tíð, áðrenn fíggjarlógin fyri 2008 verður stungin út í kortið.

- Tað hevur eisini verið nevnt, at nýggja ferjan skal vera liðug á sumri 2008 og tí vilja teir fegnir hava innlit í tíðarætlanina, sum arbeitt verður eftir.

### Hoyra onki aftur

Nólsoyingar taka landsstýrismannin upp á orðið, tá ið hann hevur sagt, at byggingin kann byrja í 2008. Men teir halda samstundis, at tað hevur týdning, at arbeiðið byrjar beinanvegin í 2008, so at skipið kann setast í sigling í 2009.

- Vit hava fingið at vita, at tað tekur 13 mánaðir at byggja eitt slíkt skip. So skal skipið sigla á sumri 2008, skal berast skjótt at.

Tí eru ymsir spurningar, sum nólsoyingar vilja hava svaraðar.

Men tá ið nólsoyingar onki høvdu hoyrt aftur í januar, sendu teir landsstýrismanninum eina áminning.

Í hesum sambandi mæltu teir til, at fundur verður ímillum landsstýrismannin og arbeiðsbólkin hjá nólsoyingum seinnapartin í morgin, mikudagin.

Men heldur ikki hetta hjálpti, tí nólsoyingar frættu framvegis onki aftur úr landsstýrinum.

- Vit eru ógvuliga hørm um, at vit onki hava frætt, sigur Jákup av Skarði

Og nú teir onki hava frætt aftur, sigur Jákup av Skarði, at teir rætt og slætt umhugsa bara at fara út í landsstýrið mikudagin og banka upp á hjá Jákup Vestergaard.

Men sum tað sæst á hinari greinini um málið, er tað ivingarsamt um tað fer at eydnast at hitta landsstýrismannin mikudagin.

# Er til reiðar at hitta nólsoyingar



*Jacob Vestergaard sigur, at sjálvandi fara tey at ráðføra seg við nólsoyingar, so at teir fáa ávirkan á, hvussu ein nýggj Rita fer at síggja út. Men so langt er málið ikki komið enn, sigur hann*

**Jacob Vestergaard er til reiðar at hitta nólsoyingar, men hann heldur ikki, at málið um nýggja Rituna er komið so langt, at stundin er komin at nólsoyingar koma upp í**

NÓLSOYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

- Eg eri altíð til reiðar at hitta nólsoyingar at tosa um nýggju Rituna.

Tað staðfestir Jacob Vestergaard, landsstýrismaður.

Hann harmast um, at nólsoyingar ikki hava fingið svar upp á tey skriv, teir hava sent landsstýrinum.

- Tað kundu teir havt fingið og tað áttu teir at havt fingið.

Men hann hevur onga forkláring upp á, hví tað ikki er hent.

Hann minnist væl áheitanina frá nólsoyingum um ein fund mikudagin og tað hevði hann eisini fyrireikað seg til.

Men nú staðfestir hann kortini, at hesin fundurin verður av ongum, tí annar fundur er settur á skrá tá.

Men tað ber altíð til at koma fund við Nólsoyingar, staðfestir hann einaferð afturat.

Kortini heldur hann, at enn er ikki so nógv at halda fund um, tí ætlanin er ikki komin so langt.

- Vit ætla sjálvandi at taka nólsoyingar við upp á ráð, men enn er tað ikki komið so langt, at tíðin er komin til tað, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at Strandferðslan hevur fingið pening til at projektera eitt nýtt nólsoyarskip.

-Tað er Strandferðslan farin í holt við. Men enn er onki liðið við tí arbeiðnum og tað ber ikki til at bjóða skipið út, fyrrenn peningur er játtaður og tí verður tað ikki fyrrenn næsta ár, at arbeiðið kann bjóðast út. Tá ið arbeiðið er komið eitt sindur longri, er sjálvandi ætlanin at hava fund við nólsoyingar fyri at fáa teirra hugsan um, hvussu skipið skal síggja út, staðfestir Jacob Vestergaard.

# Sandoyartunnilin: Klárt at bora næsta vár

**– Endaligu kanningarnar av tunnilsføringini millum Streymoy og Sandoy verða lidnar í mai mánað í ár! Hetta kom fram í einum svari í tinginum í farnu viku**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*

**Sandoy:** Gerhard Lognberg spurdi Bjarna Djurholm um sambandið um Skopunarfjørð.

Í svarinum kom fram, at klárt verður at gera verklagslógina endaliga lidna í juni mánaði.

Ætlanin er síðani at senda flokkunum lógaruppskotið áðrenn summarsteðgin og leggja lógina fyri tingið fyrst í august.

Orsøkin til, at lógaruppskotið ikki kann leggjast fyri tingið nú er, at uppskotið ikki er nóg fullfiggjað.

Varð tað lagt fyri tingið nú, hevði verið neyðugt at komið við nýggjum uppskoti í heyst fyri at kunna bjóða Sandoyartunnilin út.

Verður lógaruppskotið samtykt í løgtinginum í heyst, verður farið undir at fyrireika útbjóðingina av verkætlanini. Gongur sum ætlað, verður tunnilsarbeiðið boðið út í tíðliga í 2008. Arbeiðið kann byrja 10 vikur aftaná útbjóðingina.

Eitt alment partafelag fer at taka sær av arbeiðinum eftir sama leisti sum hinir undirsjóvartunlarnir eru gjørdir eftir.

Tunnilin verður mettur at kosta 680 mió krónur. Í langtíðarætlanini verða 20 mió játtaðar í 2008, og síðani 60 mió krónur árliga tey næstu 11 árini.

Væntast kann, at tað tekur uml. 4 ár at gera tunnilin lidnan.